Álit

í

løgtingsmáli nr. 86/2020: Uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøkum

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 18. februar 2021, og eftir 1. viðgerð tann 2. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 16. og 23. mars, 6. og 23. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya Handverksmeistarafelag, Leif Mohr, Install, Maskinmeistarafelagið, SEV og Helga Abrahamsen, landsstýrismann í umhvørvis- og vinnumálum.

Nevndin vísir á, at tað er umráðandi, at vit hava dygdargóðar reglur fyri bæði elektriskan útbúnað og fyri tey, sum arbeiða við elinnleggingum. Hetta málið hevur verið viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 87/2020 (Eltrygdarlógin), og hevur sum høvuðsendamál at tryggja, at elektriskar innleggingar verða rætt gjørdar, so tær eru tryggar og ikki til vanda fyri brúkaran.

Ein av broytingunum er, at galdandi løggildingin av persónum verður avloyst av eini fyritøkuløggildingarskipan. Skipanin er ætlað at tryggja, at fyritøkan hevur rættar førleikar, og skal hon tí seta ein fakligan ábyrgdarleiðara. Krav er um innaneftirlit, sonevnd góðskuleiðsluskipan, og harumframt er eftirlit frá triðjaparti, sum góðkennir og eftirkannar.

Nógvir spurningar hava verið settir kring ásetingarnar um hjávinnuløggilding, sum í dag verður latin sum sonevnd frítíðarløggilding. Í hoyringini vóru sterk sjónarmið bæði fyri og ímóti. Nevndin heldur tað hava týdning at tryggja fakliga støðið, og má landsstýrismaðurin tí tryggja, at øll, sum fáa slíka løggilding, hava neyðugu førleikarnar og royndirnar. Nevndin skjýtur upp, at eitt árligt gjald verður fyri hjávinnuløggilding, og metir nevndin, at eitt hóskandi gjald kann verða kr. 5.000 um árið.

Sum uppskotið fyriliggur, letur tað upp fyri, at útlendskar fyritøkur í nógv størri mun enn í dag kunnu koma higar at gera elinnleggingararbeiði, eisini uttan at hava deild av fyritøkuni staðsetta í Føroyum. Hetta heldur nevndin ikki vera ráðiligt, og skjýtur tí upp at áseta, at fyri at fáa løggilding í Føroyum, skal viðkomandi fyritøka hava fastan vinnustað her.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 4, stk. 1, nr. 5 verður orðað soleiðis:
”5) fyritøkan skal hava fastan rakstrarstað við bústaði og telefon her í landinum.”

2. Í § 4 verður sum stk. 4 sett:
“*Stk. 4*. Treytin í stk. 1, nr. 5 er ikki galdandi fyri fyritøkur, ið eru fevndar av Hoyvíkssáttmálanum, og hava bústað ella eru heimahoyrandi innan umveldisvídd sáttmálans.”

3. § 5, stk. 1, nr. 3 verður orðað soleiðis:
"3) neyðugar reglur fyri at uppfylla skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum á teimum økjum, sum eru fevnd av kravi um løggilding sambært hesi løgtingslóg og reglum settum sambært løgtingslógini."

4. Í § 8, stk. 1, nr. 3 verður "sbr. § 5, stk. 1, nr. 1," broytt til: "sbr. § 4, stk. 1, nr. 1,".

5. Í 10, stk. 1 verður "§ 7, stk. 1, nr. 1 og 2" broytt til: "§ 7, stk. 1, nr. 1-3".

6. Í § 10, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Elnevndin kann geva undantak frá § 4, stk. 1 nr. 5."

7. Í § 11, stk. 1 verður aftan á "løggilding" sett: ", hjávinnuløggildingar".

8. Í § 13, stk. 1, 3. pkt. verður "stk. 5" broytt til: "stk. 4".

9. § 13, stk. 3, nr. 5 verður strikað.

10. § 13, stk. 4 verður strikað.
Stk. 5 verður eftir hetta stk. 4.

Viðmerkingar
Til nr. 1
Galdandi reglur
Í ásetingini í § 4 í galdandi løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum v. m. verður staðfest, at persónur, sum lýkur treytirnar í § 4, stk. 1, nr. 1-5, hevur krav upp á at fáa løggilding. Høvuðskravið er kravið í nr. 1 um, at umsøkjarin skal hava staðið eina roynd, sum landsstýrið hevur góðkent, og lúka tey starvskrøv, sum landsstýrið hevur ásett. Í nr. 2 er ásett, at umsøkjarin skal hava fastan vinnustað við telefon her í landinum.

Av viðmerkingunum til § 4, stk. 1, nr. 2 í galdandi lóg, løgtingsmál nr. 132/1992, gongur fram, at tað eftir nr. 2 ikki er eitt krav um verkstað, men bert um vinnustað. Sbr. álit frá nevndini, ið gjørdi uppskot til lóggávuna "Uppskot til Sterkstreymslóggávu fyri Føroyar" sum varð lagt við løgtingsmálinum s. 97- 99).
Víst varð á, at verkstaðið hjá innleggingarfyritøkum ofta er í bilinum hjá fyritøkuni, har arbeiðsamboð, mátiútgerð o.a. eru.

Eftir § 4, stk. 3 í galdandi lóg kann Elnevndin geva undantaksloyvi frá teimum treytum, sum settar eru í stk. 1, nr. 1-5, tó hvat ið viðvíkur treytunum í nr. 1 um at standa roynd, bert tá ið serlig viðurskifti tala fyri hesum. Víst verður til viðmerkingarnar til broytingaruppskot nr. 5

Uppskot
Orðingin, sum verður skotin upp, er, at fyritøkan skal hava fastan rakstrarstað við bústaði og telefon her í landinum
Við hesi orðing er tað ein treyt fyri, at ein fyritøka kann fáa løggilding, at fyritøkan hevur fastan rakstrarstað við bústaði og telefon í Føroyum.

Við fastan vinnustað skilst, at fyritøkan støðugt er til staðar her í landinum, at tað er ein persónur í Føroyum, sum kann plikta fyritøkuna.

Til nr. 2
Ásetingin er ein fylgibroyting til broytingaruppskot nr. 1, har orðingin "*ella í einum landi, sum Føroyar hava gjørt avtalu við um útinnan av lógarreguleraðari vinnu"* verður strikað.

Í § 4, stk. 4 í galdandi løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum v. m. er ásett, at treytin í stk.1, nr. 2 (treytin um fantan vinnustað) er ikki galdandi fyri persónar ella feløg, ið eru fevnd av Hoyvíkssáttmálanum, og hava bústað ella eru heimahoyrandi innan umveldisvídd sáttmálans.

Ásetingin kom inn í lógina við § 9 í løgtingslóg nr. 55 frá 16. mai 2006 um broyting í ymiskum løgtingslógum í sambandi við Hoyvíkssáttmálan.

Í viðmerkingunum til uppskotið, løgtingsmál nr. 96/2005, varð sagt:
"Eftir § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um løggilding av elinnleggjarum v.m. kunnu elinnleggjaraarbeiði bert verða gjørd undir ábyrgd av persónum, ið hava fingið løggilding.
Eftir § 4, stk. 1, nr. 2) í somu løgtingslóg er ein treyt at fáa løggilding, at umsøkjarin hevur fastan vinnustað og telefon her í landinum. Treytin fastan vinnustað og telefon er ein forðan fyri frælsum handli við tænastum og verður tí strikað. Aðrar treytir fyri at fáa føroyska løggilding, heruppií treytirnar um útbýgving og royndir, verða eisini galdandi fyri persónar og fyritøkur, sum koma undir hesa ásetingina."

Skotið verður upp at áseta, at treytin í stk.1, nr. 5 er ikki galdandi fyri fyritøkur, ið eru fevndar av Hoyvíkssáttmálanum, og hava bústað ella eru heimahoyrandi innan umveldisvídd sáttmálans.

Føroyar hava ikki avtalur við onnur lond, sum áleggja Føroyum skyldur viðvíkjandi frælsum handli við tænastum.

Til nr. 3
Í upprunauppskotinum er í § 5, stk. 1 nr. 3 ásett, at landsstýrismaðurin kann áseta neyðugar reglur fyri at uppfylla skyldur Føroya sambært avtalum við onnur lond á teimum økjum, sum eru fevnd av kravi um løggilding sambært hesi løgtingslóg og reglum settum sambært løgtingslógini.

Skotið verður upp, at § 5, stk. 1 nr. 3 verður broytt soleiðis, at landsstýrismaðurin fær heimild at áseta neyðugar reglur fyri at uppfylla skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum á teimum økjum, sum eru fevnd av kravi um løggilding sambært hesi løgtingslóg og reglum settum sambært løgtingslógini. Tað snýr seg serliga um sínámillum góðkenning av útbúgvingum í sambandi við kravið um løggilding sambært uppskotinum til løgtingslógina og reglum settum sambært løgtingslógini.

Til nr. 4
Rætting av tilvísing.

Til nr. 5
Rætting av tilvísing.

Til nr. 6
Eftir § 4, stk. 3 í galdandi lóg kann Elnevndin geva undantaksloyvi frá teimum treytum, sum settar eru í stk. 1, nr. 1-5, tó hvat ið viðvíkur treytunum í nr. 1 um at standa roynd, bert tá ið serlig viðurskifti tala fyri hesum.

Av viðmerkingunum til § 4, stk. 3., løgtingsmál nr. 132/1992, gongur fram, at treytirnar fyri at geva undantak viðvíkjandi útbúgvingarkravinum í § 4, stk. 1, nr. 1 eru meira avmarkandi enn treytirnar fyri at geva undantak frá hinum krøvunum í § 4, stk. 1, nr. 2-5. Grundgeving fyri hesum muninum er atlit at eltrygd.

Skotið verður upp, at eins og eftir galdandi reglum skal Elnevndin eftir ítøkiligari meting í hvørjum føri sær kunna geva undantak frá kravinum um fastan vinnustað.

Til nr. 7
Í upprunauppskotinum er í § 11, stk. 1 ásett, at Elnevndin krevur eitt gjald í sambandi við umsóknir um løggilding og góðkenning sum fakligur ábyrgdari. Fyri at ivi ikki skal vera um tað, verður skotið upp, at ásett verður, at gjald eisini verður kravt í sambandi við hjávinnuløggildingar.

Til nr. 9
Sum fylgja av broyting nr. 10.

Til nr. 9
Sum fylgja av broyting nr. 1 verður skotið upp at strika § 13, stk. 3, nr. 5.

Til nr. 10
Sum fylgja av broyting nr. 1 verður skotið upp at strika § 13, stk. 4.

Við hesum broytingum og viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 27. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Christian Andreasen	